## Kaka fer ongan veg

Leysasøgurnar um at Kaka skal til Real Madrid eru afturvendandi, men enn einaferð verður sligið fast í AC Milan, at brasilski áleypari teirra ongastaðni skal. Hesuferð er tað varaforsetin í milanesiska felagnum, Adriano Galliani, ið beinleiðis vísir forsetanum í Real Madrid aftur at fáa fatur á Kaka.



## Stórur áhugi fyri Chelsea – Brøndby

Vinardysturin sum danska Brøndby IF hevur fingið til vega móti Chelsea, tykist at hava fingið gott aftursvar. Heili 18.000 atgongumerki eru longu seld, og hetta er sera nógv, tá ið talan bara er um ein vinardyst. Dysturin verður leiktur á Brøndby Stadion í Vestegnen 31. juli.

# B36 vunnið tvey stig við kæru

**Dysturin millum B36 og Skála tann 13. mai í ár endaði við javnleiki 1-1, men eftir dystin kærdi B36, tí Skála hevði nýtt ein leikara í dystinum, sum ikki stóð á dómaraseðlinum. Nú hevur B36 so fingið viðhald í kæruni frá Aganevndini hjá fótbóltssambandinum, sum hevur dømt B36 at vinna dystin 0-0**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri hálvumøðrum mánaði síðani var Skála á vitjan hjá B36 í Gundadali. Dysturin endaði við javnleiki 1-1, men tað var ikki sjálvur dysturin, sum stjól yvirskriftirnar í døgunum aftaná.

Í 71. minuttir av dystinum í Gundadali henda dagin valdi Skála at senda Sinisa Kaplanovic á vøllin. Tíverri fyri skálamenn stóð Kaplanovic av misgávum ikki á dómaraseðlinum henda dagin, og tí valdi B36 at kæra dystin til aganevndina hjá fótbóltssambandinum.



*B36 fekk í gjár viðhald í kæruni eftir dystin ímóti Skála tann 13. mai, sum endaði 1-1. Sostatt er B36 dømt at vinna dystin.*

### B36 fekk viðhald

Ikki var væntandi, at úrslitið av dystinum fór at vera broytt, men hinvegin var líkt til, at Skála helst kundi vænta sær eina bót ella í minsta lagi eina átalu fyri mistaki, sum var hent í hesum dystinum.

Í gjárkvøldið visti heimasíðan hjá B36 tó at siga, at aganevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur tikið úrskurð í málinum, og hon hevur dømt Skála at tapa dystin við úrslitinum 0-0. Sostatt fær B36 trý stig fyri dystin í staðin fyri tað eina stigið, sum teir fingu í upprunaliga dystinum, meðan Skála hinvegin missir sítt stig, sum teir annars ognaðu sær á vøllinum í Gundadali.

Úrskurðurin hevur við sær, at B36 nú er fýra stig framman fyri næsta liðið í Formuladeildini, meðan Skála fer frá 20 stigum niður á 19 stig.

### Skála júst fingið úrskurðin

Tá vit fingu orðið á formannin hjá Skála, Hans Jákup Andreasen, seint fyrrapartin í dag, segði hann, at teir júst høvdu fingið úrskurðin frá Aganevndini hjá Fótbóltssambandinum, og tí høvdu teir ikki havt tíð til at umrøða málið.

Teir fara á fundi seinnapartin at umrøðu málið, og tá hava teir møguleika at kæra málið víðari til yvirkærunevndina hjá Fótbóltssambandinum.

# Hørð revsing til Skála

**Skála fekk í gjár eina harða revsing fyri feilin, sum bleiv gjørdur í Formuladysti ímóti B36 í Gundadali tann 13. mai, tá Slavisa Kaplanovic, sum av misgávum ikki stóð á dómaraseðlinum, bleiv sendur á vøllin**

FÓTBÒLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Í gjár kom aganevndin hjá Fótbóltsambandinum við einum úrskurði í kæruni, sum B36 sendi eftir Formuladystin í Gundadali tann 13. mai, har Skála var á vitjan. Tá sendi Skála Slavisa Kaplanovic á vøllin í 71. minutti, og tíverri fyri Skála stóð Kaplanovic ikki á dómaraseðlinum.

Í úrskurðinum dømdi aganevndin Skála at tapa dystin, og hyggja vit aftur á aðrar hendingar og reglur, sum hava við slíkt at gera, so tykist úrskurðurin hjá aganevndini hjá Fótbóltssambandinum at vera rættiliga harður ímóti Skála.

### Slíkir feilir kunnu henda

Um vit leita aftur til árið 1983, so hendi tað keðiliga hetta kappingarárið, at HB í einum avgerandi dysti kom at skriva Jóannes Jacobsen tvær ferðir á dómaraseðilin, meðan Jóannes Eidesgaard slett ikki stóð á dómaraseðlinum.

HB vann sjálvan dystin, men blivu seinni dømdir at tapa hann orsaka av feilinum á dómaraseðlinum. Hetta var eisini grundin til, at HB ikki vann føroyameistaraheitið hetta árið, tí teir endaðu eitt stig aftanfyri GÍ.

Fyri at hetta ikki skuldi endurtaka seg, bleiv ein reglugerð samtykt í kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum, sum segði, at skrivligir feilir á m.a. einum dómaraseðli ikki skulu fáa fylgjur fyri ítróttarliga úrslitið, sum tað hevur gjørt í hesum førinum við dystinum millum B36 og GÍ. Sjálvandi skal ein dómaraseðil fyllast rætt út, men henda reglan bleiv m.a. samtykt fyri ikki at revsa eitt felag ítróttarliga fyri menniskjasligar feilir, sum altíð kunnu koma fyri. Ístaðin kann revsingin vera ein átala ella kanska ein bót til felagið.

Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur ikki longur við slíkar avgerðir at gera, og í staðin er tað aganevndin, sum tekur avgerðir í slíkum málum. Í aganevndini sita m.a. tveir løgfrøðingar, og hetta kann á ein ella annan hátt hava havt ávirkan á úrskurðin. Eitt er í øllum førum víst. Aganevndin hevur ikki havt regluna, sum kappingarnevndin samtykti eftir HB-málið í 1983, í huga, tá teir hava tikið endaliga avgerð í málinum um dystin millum B36 og Skála.



*Slavisa Kaplanovic var óhepni Skála-leikarin, sum ikki stóð á dómaraseðlinum í dystinum móti B36.*